# Eg skilji púrt onki

**Niels Nattestad, skúlastjóri í Venjingarskúlanum, skilir als ikki, at ongin av teimum 700 føroysku fólkaskúlalærarunum vilja vera skúlastjóri í Venjingarskúlanum**



*Niels Nattestad sigur seg harmast um, at starvið sum skúlastjóri nú verður lýst leyst á triðja sinni. – Eg undrist stórliga á, hví tað er so ringt at fáa fólk at søkja. Hetta átti at verið ein sera spennandi avbjóðing hjá einum ungum lærara, sigur Natte*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

SKÚLAMÁL

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Niels Nattestad, ella Natte, hevur verið skúlastjóri í Venjingarskúlanum í 10 ár, og tilsamans hevur hann sitið í leiðslu í skúlans í 26 ár. Hann sigur seg harmast almikið um, at starvið sum skúlastjóri nú verður lýst leyst á triðja sinni.

- Eg skilji bara púrt onki, og undrist stórliga á, hví tað er so ringt at fáa fólk at søkja. Hetta átti at verið ein sera spennandi avbjóðing hjá einum ungum lærara, sigur Natte. Hann segði seg úr starvi til 1. apríl, so nýggi stjórin kundi taka við longu tá, og vera við til at skipa komandi skúlaár.

- Men nú havi eg so játtað at verða verandi til 1. august, og vera við til at fyrireika komandi skúlaár, sigur Natte. Hann vísir eisini á, at Venjingarskúlin er í einari sera spennandi menningartilgongd, tí komandi skúlaár verður skúlin skipaður í sjálvstýrandi toymi, har sami bólkur av lærarum samstarvar um hvørja deild.

- Hetta eru vit sera spent uppá, sigur Natte, sum longu tá hann var settur í starv fyri 10 árum síðani gjørdi av at verða í sessinum í 10 ár.

## Broytti skúlin

Spurdur hví hann heldur at lærarar ikki hava hug at søkja starvið, sigur Natte, at hann hevur onga hóming av tí, men at orsøkirnar helst eru ymiskar frá persóni til persón.

- Eg meini so við – høvdu so bara nakrir fáir søkt. Men at bara ein umsókn er komin inn bæði undrar og harmar meg stórliga, sigur hann.

Til tað, at onkur vil vera við, at lønin er ikki nøktandi, sigur Natte, at tað einsamalt ikki átti at gjørt munin, men, at tað sjálvsagt hevði verið meira attraktivt, um eitt sindur meira var í lønarposanum.

- Skúlin í dag er als ikki tann sami skúlin, sum eg tók við fyri 10 árum síðani. Uppgávurnar eru vaksnar nógv og ábyrgdin hjá leiðaranum er eisini økt nógv. So sjálvsagt hevði tað hjálpt, um lønin var hægri, sigur hann.

## Bati at hóma

Uppá spurningin um maktarloysið leiðslunnar, í mun til at handfara fløkjaslig mál um eitt nú truplar næmingar, sigur Natte, at tað átti ikki at hildið øllum lærarum frá at søkja.

- Tað hava altíð verið truplir næmingar, og tað fara tað altíð at vera. So hetta er sjálvsagt ein av uppgávunum hjá einum leiðara, sigur Natte, sum leggur afturat:

- Rætt er tað, at vit leiðarar fáa ikki gjørt tað, sum vit halda vera rætt á hesum økinum. Og tað er ein trupulleiki. Men til tað er at siga, at ein lógarbroyting er á veg, ið sum heild gevur leiðslunum størri vald. Eitt nú fer at bera til at burturvísa næmingum uttan foreldranna samtykki. Harumframt fær landsstýrismaðurin heimild til at seta á stovn undirvísingartilboð til næmingar, sum orsaka av vánaligum atburði, ikki kunnu vera í einum vanligum skúlaflokki. Hetta er heilt givið ein bati í mun til truplu næmingarnar, sigur Natte.

Hann skundar sær tó at vísa á teir næmingarnar, sum ongir trupulleikar eru við.

- Vit hava so hundraðtals aðrar fittar, blíðar og góðar næmingar, sum eru ógvuliga spennandi at fáast við. At vera saman við nógvum børnum dagliga er ein stór inspiratión sum leiðari, sigur hann.

## Sterkari leiðsla

Eitt annað sum Natte vísir á, og sum kanska kann halda lærarum frá at søkja stjórastarv, er, at samstundis sum leiðslurnar hava fingið alt fleiri uppgávur, so strekkir tíðin ikki til at røkja tær.

- Men eisini á hesum økinum er ein loysn á veg, sum skal styrkja leiðslurnar. Til dømis á Venjingarskúlanum, har vit helst fara frá einari tvístreingjaðari til eina trístreingjaða leiðslu, sigur hann.

Annars vísir Natte als ikki tankanum um at fáa onnur enn lærarar í stjórastarvið.

- Eg haldi ikki, at vit eiga at avvísa tankanum frammanundan. Kanska hevði tað verið ein loysn við bæði einum fyrisitingarligum og ein námsfrøðiligum leiðara, sum sjálvsagt skuldi verið lærarautbúgvin. Nógv av orkuni hjá leiðsluni er fyrisiting, og hetta styggir kanska eisini lærarar, sigur Natte, sum kortini ásannar, at hvørki frá Lærarafelagnum ella frá politiskari síðu hevði undirtøka verið fyri einari slíkari loysn.

- So nú vóni eg bara at onkur søkir, tí her er veruliga talan um eitt starv við nógvum spennandi avbjóðingum og møguleikum, sigur Natte at enda.

# Stjórin fær meiri vald

**Ætlanin er, at skúlastjórar og leiðarar skulu hava størri heimildir til at leysa mál við truplum næmingum.**

SKÚLAMÁL

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í Mentamálum, fer ein av komandi døgunum at leggja fram uppskot um broytingar í løgtingslóg um fólkaskúlan. Av tí at freistin at fram uppskot er farin, hevur hann fingið 17 tingfólk at skriva undir uppá, at hann kortini kann leggja tað fyri tingið, áðrenn farið verður summarfrí.

## Nýggjar heimildir

Millum broytingarnar, sum landsstýrismaðurin skjýtur upp, eru nakrar broytingar viðvíkjandi heimildunum hjá skúlastjórum at vísa næmingum burtur.

Til **§ 1, nr. 20**, skjýtur hann hesar broytingar upp:

Í **§ 45** verða aftaná stk. 2 sum nýggj stk. 3 – 6 sett inn:

"**Stk. 3.** Um so er, at næmingur ikki heldur skúlans reglur, skal skúlaleiðarin seta tiltøk í verk."

"**Stk. 4.** Næmingar, ið hava atferðar-, tilknýtis- og trivnaðartrupulleikar, kunnu eftir avgerð skúlaleiðarans verða fluttir í aðrar skúlar í kommununi ella í annað undirvísingartilboð."

"**Stk. 5.** Landsstýrismaðurin ger nærri reglur um, hvørji tiltøk skúlaleiðarin skal seta í verk sbrt. stk. 3, og hvørji atlit, sum kunnu geva grundarlag fyri avgerð hjá skúlaleiðaranum at flyta næming í aðrar skúlar, sbrt. stk. 4."

"**Stk. 6.** Landsstýrismanninum verður heimilað at seta á stovn serligan skúla fyri næmingar við atferðar-, tilknýtis- og trivnaðartrupulleikum, ið ikki á annan hátt kunnu fáa nøktandi undirvísing í fólkaskúlanum."

## Viðmerkingarnar

Í viðmerkingunum til lógarbroytingarnar stendur soleiðis:

**§ 45, stk. 3**

Í skúlanum skulu verða skipað viðurskifti, so at allir næmingar skulu trívast og kenna seg tryggar í skúlans arbeiði og umhvørvi. Við støði í reglum sambært § 60 um fyriskipanir til tess at fremja gott skil í skúlunum og umsjón við næmingunum í skúlatíðini ger skúlastýrið ítøkiligar atferðarreglur fyri tann einstaka skúlan og reglur um umsjónina við næmingunum í skúlatíðini.

Skúlin skal skipa so fyri, at allir næmingar kenna reglur skúlans viðvíkjandi atferð, atburði og fyriliti fyri øðrum. Eisini verður dentur lagdur á álvaran at halda reglur skúlans, so at allir næmingar virða sosiala felagsskapin í skúlanum. Um næmingur ikki megnar at fylgja reglum skúlans, setur skúlaleiðarin tiltøk í verk.

**Stk. 4**

Næmingur, ið hóast fyrisetta mannagongd og átøk skúlans, framhaldandi ikki virðir atferðarreglur skúlans, kann verða fluttur í annan skúla ella annað undirvísingartilboð. Tað er skúlans leiðsla, sum tekur hesa avgerð.

**Stk. 5**

Landsstýrismaðurin ger nærri reglur um tey tiltøk, sum skúlaleiðarin setur í verk sbrt. stk. 3., og hvørji viðurskifti kunnu vera grundarlag fyri at flyta næming í annan skúla ella í annað undirvísingartilboð.

**Stk. 6**

Heimilað verður landsstýrismanninum at seta á stovn serligan skúla fyri næmingar, ið hava atferðar-, tilknýtis- ella trivnaðartrupulleikar.

Undirvísingin verður grundað á bæði fakliga og sosiala menning. Dentur verður lagdur á, at næmingarnir í eitt tíðarskeið frá 3 mánaðum til tvey ár fáa eitt serligt undirvísingartilboð, sum skal gera teir førar fyri aftur at kunna luttaka í undirvísingini í fólkaskúlanum og fylgja sosialu reglunum í einum vanligum skúlaflokki.